MÁLTEIGURIN

Blind vil

Ikki er tað bara Jeltsin, stakkalin, sum má opererast, ella *skerast í hjartað*, sum summi siga.

Eisini aðrir leiðarar hava verið noyddir at lata seg innleggja.

Ein teirra er pávin, sum sambært tíðindunum nú ein dagin fekk *blindgørnina* tikna. Hetta er í hvussu er tað, sum eitt nú Útvarp Føroya veit at fortelja okkum.

BBC kallar hetta organið *appendix*. Og hetta man eisini vera tað, læknar kalla tað.

Nú er vituliga munur á pávanum í Rom og so okkum vanligu deyðiligu. Hann er kanska so mikið fínur at hann hevur *blindgørn*. Men føroyingar flestir munnu kalla hesa lítlu slintruna, sum so nógv hava fortreð av, *blindtarmin*.

Og hetta orðið finst enntá í einum skemtiligum staðanavni í einari bygd.

Tað er lítið at ivast í, at *blindtarmur* er komið inn í føroyskt úr donskum *blindtarm*.


Tí ikki mundu okkara forfedrar vera serliga kønir í, hvussu vit sóu út innan. Afturfyri vistu teir rættiliga nógv um innvøllin á seyði, hvali, fiski, fugli o.ø. og kendu tískil bæði *ágarnar* hjá kalva, *skúvgarnar* hjá fiski annars og *langabotn*.

Blindgørn man so vera ein mekanisk umseting av *blindtarmur*, sum onkur man hava hildið líkjast donskum ov nógv.

Men teimum einstøku liðunum í orðinum *blindtarmur* feilar einki, hvat tí nationala viðvíkur. Eitt er, at *blindur* sjálvandi er føroyskt. Men eisini *tarmur* hevur verið føroyskt, so leingi, sum nakað mál hevur itið føroyskt. Ikki bara kennir Svabo hetta orðið væl, eisini teir heilt gomlu, teir, sum tosaðu norrønt, vistu, hvat *þarmr* er.

Tað átti tí ikki at verið heilt av leið, at latið føroyingar sloppið at havt navnið á hesum partinum av innvølinum í frið og náðum.

JHB



© BFS 1946

ROKKJALLARIN

Vit áiaka okkum at selja fyri fólk.

Eisini keypa vit deyðsbúgv.

Rokkjallarin - Tlf. 1190

Tinghúsvegur 42 - 100 Tórshavn

ADC-Heilsølan

Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 15828 - Fax 15893

ARBEIÐSHANDSKAR

Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL

frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar

ADC

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

Ruba reinsað – væl reinsað

Opið er:
Mánad.–friggjad.
kl. 10–12 & 13.30–17



REINSAR ALT!
Klæði, gardinur, teppi, ruskinn o.a.

Ruba

Magnus Heinasonarg. 15 - Havn - Box 1267 - **Tlf. 16301**

KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Jógvan Fo'lleað
410 Kollafirði

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: SAKFØRARIN

T	Á	R	A	N	D	A	R	S	S	U	R		8		Í
85	R	O	Ð	A	N	D	I	V	Í	N		L	A		8
E	I	K	I	N			K	I	N	A	M	I	N	N	I
I	N	N	L	I	T		A	N	I		A	K	K	E	R
D		A		N	Æ	R	E	I			I	K	A	S	T
E	U			G	R	I	Ð		F	K		A	R	T	I
		S				S		A	I	R	E			A	N
L	Æ	T	T	U	R	O	G	L	J	Ó	S	U	R		G
	V	A	R	L	Á	T	U	R	I	N	T	Í	N		
T	I	R	O	L		T	A	E		A	R	G	A	R	
A	N	I	T	A		O	N	Y	X		A				
S	L			P	Ø		E	Ð	L	A			T	B	
M	E	T	R	O		B		U		G	R	E	V	U	R
A	I	R		O	K	A		R	U	N	A	V	Í	K	
N	K		F	L	Ø	A	A		N		K	N		A	K
	I	R	A		R	A	N	N	S	A	K	A	N		Í

Hvønn leygardag

verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

Loysunarorð: **86**

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR